Meira pengar í Landsbankanum

Gjaldførið hjá landskassanum var í august mánaði betur, enn tað hevur verið seinasta árið. Í miðal var innistandandi í Landsbanka Føroya í august mánaði 1.667 milliónir krónur. Í hesum árinum hevur gjaldførið verið niðri á 1.258 milliónum og vent, men seinastu tríggjar mánaðirnar er gjaldførið batnað munandi.

Orsøkin er fyrst og fremst, at landsstýrið í juni mánaði tók eitt lán á 430 milliónir krónur. Hetta lán var tikið tá fyri at tryggja sær góða rentu, og lánið skal brúkast til at rinda lán, sum fellur til gjaldingar tann 24. november. Tá fellur gjaldførið hjá landskassanum við 350 milliónum krónum.

Kravið til gjaldførið hjá landskassanum er, at 15 prosent av BTÚ skulu standa inni í Landsbankanum, og tað svarar í løtuni til 1.500 milliónir. Tá ið gjaldførið fer niður um hetta, kann landskassin útgeva lán fyri at bøta uppfylla kravið um minstainnlán í Landsbankanum. Í løtuni er kredittvirði hjá Føroyum gott, og tí er eingin trupulleiki at fáa lán til gjaldførið hjá landskassanum.

Gjaldførið hjá landskassanum í august var tað frægasta síðani mai mánað í fjør.

ek

Vakrasti urtagarður kjósast

Fríggjadagin fer Klaksvíkar kommuna at kjósa vakrasta urtagarðin í kommununi. Tað er mentanarnevndin hjá býráðnum, sum hevur tikið uppaftur tiltakið at finna vakrasta urtagarð í Klaksvík.

Ein bólkur við Gunvá við Keldu, Karl Hera Joensen og Hans Hjalta Skaale hevur gjørt av, hvør vakrasti urtagarður er, og fríggjadagin verður tað avdúkað fyri almenninginum, hvør hesin urtagarðurin er.

Tríggir borgarar í Klaksvík hava fingið at vita, at teirra urtagarður telist millum tríggjar teir vakrastu í býnum, og á móttøku í Býráðshøllini fríggjdagin verður avdúkað, hvør teirra skal heiðrast sum tann vakrasti í ár.

ek

Strandferðslan koyrir fólk í land

21 fólk hjá Strandferðsluni hava fingið at vita, at tey verða søgd úr starvi, tá ið Leirvíksfjarðaleiðin verður løgd niður næsta ár

STRANDFERÐSLAN

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Næsta summar verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, og tá verður eisini Leirvíksfjarðaleiðin hjá Strandferðsluni løgd niður.

Leiðslan á Strandferðsluni hevur nú sent ætlanarskriv um uppsøgn til 21 fólk, sum sigla við Dúgvuni og Sam.

– Í dag sigla bæði Dúgvan, sum hevur tríggjar manningar, og Sam, sum hevur tvær manningar, á leiðini. Tá tunnilin letur upp er bert neyðugt við hálvari aðru manning umborð á Sam, sum kemur at sigla millum Syðradal og Klaksvík, sigur Regin Vágadal, rakstrarleiðari hjá Strandferðsluni.

– Strandferðslan hevur ikki møguleika at flyta fólkini í annað starv, og ein avleiðing av hesum er, at 21 fólk á Oyggjaleiðum hava fingið skriv um ætlaðu uppsøgn.

Tá ið Norðoyatunnilin letur upp, fer farleiðin um Leirvíksfjørð samstundis í søguni. Tað kostar 21 fólkum hjá Strandferðsluni starvið

Norðoyatunnilin skal eftir upprunaligu ætlanini lata upp um hálvan august næsta ár, men tað eru góð útlit fyri, at upplatingin kann verða nakað fyrri – helst í mai mánaði.

Kunnu læra um fólkaræðið gjøgnum fólkaatkvøðuna

Í gjár var 14. september, og formaðurin í Tjóðveldisflokkinum nýtti høvi til at spyrja skúlalærarar og skúlaleiðslur um fólkatkvøðan í 1946 verður viðgjørd í fólkaskúlanum og miðnámsskúlanum. Hann heldur, at tað ber til at læra nógv um fólkaræðið við at viðgera fólkaatkvøðuna

14. SEPTEMBER

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

– Tað er eingin orsøk til at fjala eina so týdningarmikla hending og gera hana til eitt tabu. Vit eiga heldur at brúka hana til at læra um fólkaræðið, sigur Høgni Hoydal um fólkaatkvøðuna 14. september í 1946

14. september í 1946 atkvøddu føroyingar fyri loysing frá danska ríkinum, men úrslitið av fólkaatkvøðuni var ongantíð sett í gildi.

Hesa hending heldur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum vera góða til at læra um fólkaræðið í fólkaskúlanum og í miðnámsskúlanum.

Í einum opnum brævi til lærarar og skúlaleiðslur spyr Høgni Hoydal, hvussu fólkaatkvøðan í 1946 verður viðgjørd í skúlunum.

– Tá ið eg sjálvur gekk í fólkaskúla, hoyrdu vit einki um fólkaatkvøðuna, og tað var ikki fyrr enn eg kom í miðnámsskúla sum 19 ára gamal, at vit viðgjørdi evnið. Eg rokni við, at nógv er broytt í fólkaskúlanum, síðani eg gekk har, men eg kundi hugsa mær at fingið at vita, um tað verður undirvíst um fólkaatkvøðuna í skúlunum, sigur Høgni Hoydal.

Skal ikki gerast tabu

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum heldur, at partapolitikkur eigur ikki at forða fyri, at fólkaatkvøðan verður tikin fram í fólkaskúlanum og í miðnámsskúlunum.

– Nógv halda, at tað kann gerast ov partapolitiskt at taka eitt slíkt evni upp, men tað er eftir míni bestu sannføring ein undanførsla, sum ikki hevur hald í veruleikanum, sigur Høgni Hoydal, sum heldur, at tað ber til at viðgera málið kritiskt og royna at lýsa allar tættir í hendingini.

– Tað er eingin orsøk til at fjala eina so týdningarmikla hending og gera hana til eitt tabu. Vit eiga heldur at brúka hana til at læra um fólkaræðið.

Høgni Hoydal hevur ikki stílað sín fyrispurning til nakran ávísan persón, men hann vónar at fáa eitt svar.

– Eg vóni, at onkur lærari ella skúlastjóri vil svara mær, so vit kunnu fáa eina hóming av, hvussu fólkaatkvøðan verður viðgjørd í skúlunum, sigur hann.

Fólk á útoyggj stúra fyri einskiljing

Hvørja ávirkan fær tað fyri fólkið á smáplássum, um flutningsskyldan verður avtikin, spyr Kári P. Højgaard landsstýrismannin, nú avgjørt er at privatisera Farmaleiðir og avtaka flutningsskylduna

POLITIKKUR

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

– Sambært tíðindunum í Útvarpi Føroya týsdagin 30. august resta enn nøkur viðurskifti, áðrenn klárt er at einskilja Farmaleiðir. Samstundis váttaði Jógvan við Keldu landstýrismaður sambært tíðindasendingini, at eingin skylda verður at koyra til smáplássini.

Hetta hevur fingið løgtingsmannin hjá Sjálvstýrisflokkinum, Kára P. Højgaard at seta Jógvani við Keldu, landsstýrismanni við ábyrgd fyri Strandferðsluni fyrispurning um hesi viðurskiftini.

Fólka stúra

Kári P. Højgaard sigur, at tíðindi sum hesi loypa ekka á fólk og spurningurin verður altíð. »Hvussu kemur hetta at ávirka tey fólk, sum ikki búgva í miðøkinum?«

– Sum er ber til fyri rímuligan pening at flyta fisk frá uppboðsølu norðanfjarðs til virkingar í t. d. Sandoy ella Suðuroy; sama er sjálvsagt eisini galdandi hinvegin.

– Hvussu kemur einskiljingin av Farmaleiðum at ávirka fiskaflutningin frá uppboðsølum til framleiðara og avskipingarhavn, spyr Kári P. Højgaard.

Ávirkan

Hann spyr eisini, hvørja ávirkan heldur landstýrismaðurin, at tað fær fyri fólkið á smáplássum, um flutningskyldan verður avtikin; og verða ætlaðu broytingarnar samskipaðar og gjørdar í samráð við landstýrismannin í vinnumálum, ið varðar av Postverkinum.

Eisini spyr Kári P. Højgaard um nøkur loysn er funnin viðvíkjandi oljuflutninginum til útoyggjar í tunnum.

Tað skuldi atkvøðast um fyrispurningin í løgtinginum seinnapartin í gjár.